Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Eitt framstig fyri umhvørvið

Oddagrein

ARBEIÐSBÓLKURIN, sum skal lýsa føroyska umhvørvið og føroysku náttúruna, er farin til verka. Hóast vit ikki fáa nakað úrslit at síggja fyrr enn um fleiri mánaðir, so skal landsstýrismaðurin, Eyðun Eltør, hava rós fyri at taka hetta stigið, tí hetta arbeiðið skal miðja eftir at fáa ein veruligan umhvørvispolitikk í Føroyum. Ein slíkan hava vit ikki í dag, og í mongum førum eru vit eftirbátur við lít. Vit klára ikki at skipa okkum sjálvi og vit klára heldur ikki at lúka treytir í altjóða sáttmálum, sum vit hava tikið undir við. Tað er tí í tøkum tíma, at vit fáa ein miðvísan umhvørvispolitikk og eina náttúrufyrisiting.

UMHVØRVISBÓLKURIN skal fyrst og fremst lýsa støðuna í Føroyum í dag bæði viðvíkjandi umhvørvi og náttúru. Hann skal vísa á tey viðurskifti, sum vit kanska hava gloymt og lítið ella einki gera við í dag og hvat vit gera skeivt. Tey eru neyvan fá, tí vit bæði dálka og fara so sum so við náttúruni og náttúruvirðum, sum tey undanfarnu ættarliðini dugdu at umsita, tí alt skuldi koma til sættis, og náttúran, sum alt lív hvíldi á, skuldi breyðføða komandi ættarlið.

SOLEIÐIS hugsa vit ikki í dag. Í dag hugsa vit bara um at troyta tilfeingið sum mest, og hugsa ov lítið um avleiðingarnar. Vit hugsa ov lítið um tað árin og tær avleiðingar, sum hjálievnini og burturkast hevur fyri umhvørvið og vistfrøðina.

Á HESUM øki hava vit nógvar gamlar lógir og reglur. Lógir um t.d. vatn og hegn, sum kanska eru um 70 ára gamlar. Vit hava lóg um náttúrufriðing og lóg um skógarfriðing. Vit hava umhvørvislógina frá áttatiárunum og vit hava eina rúgvu av altjóða sáttmálum at halda okkum til. Vit hava tí eitt stórt og komplekst lógarverk, sum arbeiðsbólkurin óivað skal fara ígjøgnum bara fyri at lýsa støðuna formliga.

STØÐAN skal lýsast í eini frágreiðing, sum skal vera grundarlag undir einum orðaskifti í Løgtinginum. Burtur úr hesi frágreiðing og orðaskiftinum skal ein umhvørvispolitikkur orðast. Nýggjar lógir og samskipaðar lógir koma væntandi burtur úr hesum arbeiði. Men tá alt hetta er fingið frá hondini – vónandi um ikki alt ov nógv ár – so skal umsitingarparturin koma upp á pláss, eins og fólk mugu gerast meira tilvitandi um henda spurning. Alt hetta mál hevur alstóran týdning fyri okkum, tí alt lív okkara hvílir á náttúruni og tí, sum vit fáa burtur úr henni. Hesin spurningur hevur ikki minst týdning, nú alivinnan, sum er stór dálkingarkelda, gerst størri og størri, og nú vit kanska standa á gáttini til eina oljuvinnu.

MEN til ein framtíðarpolitikkur er orðaður, mugu vit framhaldandi virka fyri einum reinum og ódálkaðum umhvørvi og ikki gera ov stór inntriv í náttúru okkara.

Sosialurin

Fingu løgnan lut í garnið

Oknin úr Saltangará fekk ein minikavbát í gørnini. Kanningar nú vísa, at talan var um seismikk leitiútgerð

JÚSTINUS LEIVSSON
EIDESGAARD

Tíðliga um morgunin 15. august vóru teir umborð á garnabátinum Oknini úr Saltangará varugir við, at ein løgin lutur hekk í gørnunum. Teir royna eftir svartkalva og lógu og drógu undir Føroyum á pos. 623584 W og o51084 N. Teir visti ikki hvat hetta var fyri ein lutur, men hann líktist mest einum mini kavbáti. Hann var ein metur langur, og eitt torn var á miðjuni. Tveir veingir gingu út frá torninum. Luturin var orangelittur og vigaði millum átta og tíggju kilo.

Luturin varð lagdur á dekkið og tveir dagar seinni var túrurin av og teir hildu leiðina á Runavík at landa hjá BETA. Teir boðaðu Færøernes Kommando fra og eisini politinum í Runavík. Politiið í Runavík kannaði lutin uttan tó at koma nærri, hvat hesin hevur verið nýttur til.

Sosialurin fekk myndir av lutinum, og upplýsingar frá politinum um hvat stóð á honum. Vit gjørdu eina roynd á alnótini og hendan gav beinanvegin úrslit. Á lutinum stóð DIGI-COURSE og vit settu ein punktum og „com“ aftan fyri og beinanvegin kom heimasíðan hjá hesi amerikonsku fyritøku, sum hevur specialiserað seg í útbúnaði til seimsikk royndin, fram á skíggjan.

Luturin, sum Oknin fann, eitur Compass Bird og teknisku upplýsingarnar um hendan sæst á alnótini.

Steyni Andreassen, skipari, við løgna lutinum, sum hekk fastur í gørnunum

Á lutinum stóð at lesa, hvør ið hevði gjørt hetta og tí var lætt at finna upprunan á alnótini

Slakur fiskiskapur hjá garnabátunum

-Vit liggja í ein landnyrðing úr Fugloynni og akkurát nú er slakkur fiskiskapur, men seinasti túrur royndist væl, sigur Steyni Andreassen, skipari á Oknini

JÚSTINUS LEIVSSON
EIDESGAARD

Teir sjey garnabátarnir, sum royna eftir svartkalva, liggja og draga gørn upp frá 280 til 300 favna dýpi í kantinum kring oyggjarnar. Fiskiskapurin er í løtuni heldur slakkur, men teir kunnu ugga seg við, at prísurin er „í ordan“, sum tikið verður til millum garnamenn norðanfjørðs.

- Vit ísa umborð og tí eru túrarnir ikki langir. Seinasti tururin royndist bara væl. Vil landaðu 17. august hjá Beta í Runavík, og veiðan vá 25 tons. Prísurin lá eitt sindur yvir 18 krónur, sigur Steyni Andreassen av Norðskála, sum er skipari á Oknini.

- Vit liggja akkurát nú í ein landnyrðing úr Fugloynni og Ágot úr Klaksvík liggur eisini her nærhendis. Eg hoyrdi frá Vágasteini, Anitu og Ólavi Hvíta, teir liggja vesturi á Rygginum og draga. Vestland og Thor eru á Munkagrunninum, so vit eru eitt sindur víða. Eg veit ikki rættuliga hvar havtaskubátarnir Nim og Gudrun eru, sigur Steyni Andreassen, skipari.

-Vit hava havtaskuloyvi, men seinasta árið hava vit bara fiskað svartkalva.

Skiparin á Oknini sigur, at hóast bátarnir, sum ísa svartkalva, bert eru úti eina viku, so er tað stríggið lív. 11 manns eru við Oknini.

Garnaveiðan eftir svartkalva tók seg upp beint í ringastu búskaparligu kreppu í nýggjari tí í 1993. Tá gingu framherjar í føroyskum vinnulívi nýggjar leiðir og í dag er svartkalva og havtaskuveiðan í Føroyum ein lønandi vinna við níggju skipum, sum burturav fiska hesi fiskasløg við gørnum.

Óverdugt bara at krevja

Føroyingar eiga at gjalda fyri luttøkuna í Norðurlandaráðnum og ikki bara krevja og njóta ágóðan av samstarvinum, halda føroysku umboðini í Norðurlandaráðnum

EYÐUN KLAKSTEIN

Føroyingar skulu ikki bara krevja og njóta ágóðan av samstarvinum í Norðurlandaráðnum. Vit eiga eisini at gjalda fyri okkara luttøku.

Tað halda báðir teir føroysku limirnir í Norðurlandaráðnum.

Í løtuni eru tað danir, sum gjalda limagjaldið fyri okkum, og tað dámar føroysku umboðunum illa.

- Tað kennist óverdugt og snópisligt at leggja uppskot, sum kosta pengar, fyri Norðurlandaráðið, tá vit sjálvir ikki gjalda eitt oyra til hetta samstarvið, sigur Dan Reinert Petersen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin.

- Hetta er ein prinsipiellur spurningur. Sjálvandi eiga vit at gjalda fyri luttøkuna, tí vit fáa nógv burtur úr samstarvinum, sigur Jógvan við Keldu, løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin.

Ráða yvir mandatinum

Teir báðir tinglimirnir umboða Føroyar í Norðurlandaráðnum, men tað er gjøgnum donsku luttøkuna, at føroysku limirnir sleppa við.

Danir hava avsett tveir av sínum parlamentarisku sessum til Føroyar, og føroyingar gjalda ikki eitt oyra fyri hetta.

Jógvan við Keldu situr í Norðurlandaráðnum sum partur av konservativa bólkinum, og Dan Reinert Petersen er partur av sosialdemokratiska bólkinum.

- Tá danir hava latið okkum mandat, sum vit sjálvir ráða fullkomiliga yvir, so eiga vit eisini at gjalda fyri tað, sigur Dan Reinert Petersen.

- Hetta er ein prinsippmál, sigur Jógvan við Keldu

- Hetta er snópisligt, sigur Dan Reinert Petersen

Má broytast

Limalondini í Norðurlandaráðnum gjalda hálva promillu av bruttutjóðarúrtøkuni sum limagjald.

Í løtuni gjalda Føroyar ikki eitt reytt oyrað, tí danir senda kekkin fyri okkum, og tað er hetta, sum eigur at verða broytt í stundini, stendur tað til Dan Reinert Petersen og Jógvan við Keldu.

Teir hava fleiri ferðir fórt hetta fram mótvegis landsumsitingini, men enn er eingin loysn at hóma.

Í løgmansrøðuni verður sagt, at landsstýrið er farið undir at fyrireikað eitt uppskot um, at Føroyar gjalda sín lutfalsliga part til norðurlendska samstarvið. Talan er um eina árliga upphædd upp á millum eina og tvær milliónir krónur.

Sosialurin hevur skilt, at landsstýrið hevur vent sær til donsku stjórnina fyri at sleppa at gjalda, men danir eru ikki hugaðir fyri hesum.

Senda milliónir hendan veg - Hóast danir eru sinnaðir at gjalda fyri okkum, so eiga vit - uttan at spyrja teir eftir - at senda teimum ein kekk fyri okkara part av luttøkuni. Vit mugu gjalda fyri okkum, sigur Dan Reinert Petersen og vísir á, at føroyingar fáa stóran ágóða av samstarvinum í Norðurlandaráðnum, millum annað til orðabókaarbeiði og ymisk mentanartiltøk.

Seinastu fýra árini hevur Mentanargrunnurin hjá Norðurlandaráðnum til dømis sent tríggjar milliónir krónur til Føroyar sum stuðul til ymisk mentafólk og mentanartiltøk.

Og í næsta mánaði fáa føroyingar ein fastan lim í nevndina fyri mentanargrunnin. Enn einaferð uttan at gjalda fyri tað.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður, umsitir hetta mál, men tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá honum undan evstamarki í gjár.

Øssur framsýning í Maribo

Næstu tveir mánaðirnar fer Øssur Mohr at hava framsýning á Lollandi

Leygardagin letur ein framsýning hjá fuglfirðinginum, Øssur Mohr, upp á Gallarí Hilden í Maribo á Lollandi.

Á framsýningin fer Øssur at sýna fram einar 30 málningar, sum allir eru málaðir í hesum árinum.

Tað var gallaríið í Maribo, sum vendi sær til Øssur fyri at fáa hann at sýna fram. Eigarin hevði sæð málningar hjá Øssuri aðrastaðni í Danmark og hevði á hendan hátt fingið áhuga fyri føroyska listamálaranum.

Øssur Mohr er nú farin niður at gera klárt til framsýningina, og hann verður eisini til staðar, tá ferniseringin verður leygardagin.

Framsýningin letur upp klokkan 13.00 leygardagin og er opin til klokkan 17.00.

Málningarnir hjá Øssur verða at síggja á Gallarí Hilden á Str. Boulevard nummar 20 í Maribo fram til 26. oktober.

ek

Shetland Cruise 2000 summarið www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag

Gisting á hotelli
(í lágarstíð) er einans ... 864,- fyri hvønn

Gisting á vallaraheimi
(í lágarstíð) er einans ... 691,- fyri hvønn

Privat gisting
(í lágarstíð) er einans ... 819,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 – 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverðum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.

Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo